# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 22/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)** (Tíðaravmarkað heimild hjá landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 15. september 2020 og eftir 1. viðgerð tann 22. september 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. og 20. oktober, 12., 17. og 24 november og 1. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri skeinkistøð, Ferðavinnufelagið, Farsóttarnevndina, landsstýrismannin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, og løgmann, Bárð á Steig Nielsen.

Ein **samd nevnd** hevur hesar viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum biður um at seta í gildi aftur tvingsilsheimild at kunna steingja ella avmarka upplatingartíðir hjá matstovum og skeinkistøðum, sum fór úr gildi 31. august. Biðið verður um heimild til 31. desember 2020.

Vinnunevndin vísir aftur hesaferð á, at heimildin til at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av koronufarsóttini er smittuverjulóggáva, og at tað ikki er í samsvari við gott lógarsmíð at brúka matstovulógina til hetta endamál. Ei heldur er tað í samsvari við ábyrgdarbýtið í landsstýrinum, har tað er landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum hevur evstu ábygd av smittuverju, ikki landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum.

Kemur eitt stórt koronuútbrot, har nógv verða smittað, so røkkur henda lóg einans til matstovur og skeinkingarstøð. Sum víst í undanfarna álitinum í sambandi við løgtingsmál nr. 149/2019, so er henda lóggáva ivasom, og kemur til skarpskeringar, kann ivi verða um, hvørt lógin hevur gildi.

Tá landsstýrismaðurin í summar fyrstu ferð kom við tvingsilsásetingum í matstovulógini, mæltu 6 av 7 vinnunevndarlimum til at fella uppskotið. Málið varð tá beint aftur í nevnd og í seinna álitinum valdu umboðini hjá samgonguni kortini at mæla til, at heimildin varð latin, men bert fram til 31. august, og søgdu greitt at:
"Um tað verður neyðugt við fleiri heimildum, eigur landsstýrismaðurin at fáa sær røttu heimildarnar til vegar, soleiðis at heimildin ikki bert umfatar útskeinkingarstøð ella matarstøð. Heimildin eigur at vera meira generell, og geva heimild at taka neyðug stig, har nógv fólk savnast, eitt nú til fótbóltsdystir, skrúðgongur og annars størri fólkamongdir.

Tað er ikki nøktandi, at spurningurin um lógarheimildina hjá landsstýrinum er ógreiður, og henda spurning eigur landsstýrismaðurin at fáa greiðu á, áðrenn møguligt nýtt uppskot um slíka heimild aftur verður lagt fyri Løgtingið."

Í viðgerðini er komið fram, at landsstýrið ikki hevur tikið stig til at útvega sær generella heimild, og at eingin broyting í smittuverjulóggávu er ávegis.
Hetta harmast nevndin um. Tí tað er eyðsæð, at hóast stórur smittuvandi kann standast í náttarlívinum, so hava størru smittuútbrotini í Føroyum higartil verið aðrastaðni, har nógv fólk er komið saman.

Kemur eitt størri útbrot, til dømis í sambandi við at nógv fólk kemur til Føroya um jólini, so er lítil ivi um, at tørvur kann blíva á at avmarka annað enn matstovur og barrir. Her eru fleiri møguleikar, landsstýrið kundi nýtt. Galdandi epidemilóggáva kundi verið broytt soleiðis, at landsstýrið fekk neyðugu smittufyribyrgjandi heimildirnar har. Eisini kundi lóggávuøkið verið yvirtikið, og tá kundu føroyskir myndugleikar ásett júst tær reglur, sum tørvur er á.

Stórur munur er á einari barr ella dansistaði, har opið er um náttina, og so einari matstovu, har fólk kunnu sita við góðari frástøðu. Nevndin mælir tí staðiliga landsstýrismanninum til, at um hann fær hesar heimildir, so at brúka tær við skili og greitt skilja ímillum matstovur og skeinkingarstøð.

ENDURGJALDSSPURNINGUR
Lógaruppskotið ásetir, at “Ger landsstýrismaðurin av at avmarka vanligu upplatingartíðirnar og afturlatingartíðirnar ella at minka mest loyvda tal av gestum, hevur matstovan ella skeinkingarstaðið rætt til stuðul eftir løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19.” Við hesum verður skipanin við stuðli til fastar útreiðslur, sum fór úr gildi 31.august, aktiverað fyri fevndu fyritøkur, um landsstýrismaðurin brúkar heimildina.

Nevndin vísir á, at tá lóggivið verður á henda hátt fyri ein úrvaldan part av vinnuni, og ikki fyri vinnuna ella samfelagið sum heild, so kann ikki útilokast, at talan kann blíva um vanligt endurgjaldskrav fyri mista inntøku, hóast fyritøkurnar kunnu fáa ávísan stuðul til rakstur. Eisini av hesi orsøk áttu smittufyribyrgjandi reglurnar at verið generellar og ásettar í smittuverjulóggávu.

Farsóttarnevndin, ið er fremsta smittuverjuráðgevingin hjá landsstýrinum, hevur ikki mælt til at gera broytingar í matstovulógini. Tá Farsóttarnevndin hevur víst á, at tað kundi verið hent við betri lógaramboðum fyri at forða smittuspjaðing, hevur talan verið um generella lóggávu, við ásetingum í smittuverjulóggávu.

IVI SÁDDUR UM, HVØRT LÓGIN FÆR VIRKNAÐ
Í sambandi við, at málið varð viðgjørt í summar, vístu løgfrøðiliga ráðgevingin hjá løgmanni, hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og hjá Løgtinginum á, at ásetingarnar áttu at verið gjørdar í epidemilógini. Somuleiðis segði danska Heilsu- og Eldramálaráðið tá, um tað at gera smittufyribyrgjandi ásetingar í matstovulógini at: ”Sundheds- og Ældreministeriet er enigt med Lagmandskontorets juridiske afdeling i, at sagsområdet vedrørende forhindring af smittespredning er et dansk sagsområde. Efter ministeriets opfattelse foreligger der derfor ikke den fornødne kompetence til at indføre den tiltænkte hjemmel i Restaurationsloven.”

Spurnartekin hevur sostatt verið sett við, um lógarheimildin í praksis fær gildi.

Annars verður víst á viðmerkingarnar í sambandi við løgtingsmál nr. 149/2019 og heitir nevndin enn einaferð staðiliga á landsstýrið um at fáa røttu smittuverjandi amboðini upp á pláss í røttu smittufyribyrgjandi lóggávuni.

<u>Harumframt hava Johan Dahl, Beinir Johannesen og Jákup Mikkelsen hesar viðmerkingar:</u>
Undirritaðu halda tað vera átaluvert, at landsstýrismaðurin enn einaferð kemur í Løgtingið við eini lóg á henda hátt. Undirritaðu gera greitt, at heimild verður latin hesaferð, men skulu smittufyribyrgjandi heimildir fáast frameftir, so er neyðugt at fáa rætta lógarheimild til vega umvegis landsstýrismannin í heilsumálum.

<u>Harumframt hava Bjørt Samuelsen og Bjarni Kárason Petersen hesar viðmerkingar:</u>
Smittuverjulóggávan átti fyri langari tíð síðan at verið yvirtikin, og tað kundi verið gjørt innan fáar vikur. Nú lóggivið verður á smittuverjuøkinum, fegnast vit um, at hetta fer at skapa fordømi soleiðis, at tað verður siðvenja at lóggeva á teimum økjum, vit meta tørv vera á, uttan mun til, um hesi løgfrøðiliga verða mett sum ikki-yvirtikin øki. Tí partinum eru vit samd í. Við grundgevingunum í felags viðmerkingunum hjá allari Vinnunevndini taka vit kortini ikki undir við málinum.

<u>Harumframt hava Henrik Old og Bjarni Hammer hesar viðmerkingar:</u>
Í viðgerðini av fyriliggjandi uppskoti eins og við uppskotinum, ið varð lagt fyri tingið í summar, er ivi sáddur, um slík lógarbroyting kann vera brot á heimastýrislógina.

Nevndin hevur síðani býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen) tekur ikki undir við málinum, og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Johan Dahl, Beinir Johannesen og Jákup Mikkelsen) vísir á, at um eitt smittuútbrot skuldi komið millum jól og nýggjár er neyðugt, at lógin ikki fer úr gildi á nýggjárinum. Tað er tískil skilabetri, at lógin fær gildi fram til 1. februar 2021. Á tann hátt fær landsstýrið eisini tíð og høvi til at fáa tær røttu smittufyribyrgjandi heimildirnar til vegar.

Minnilutin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 2 verður “31. desember 2020” broytt til: “1. februar 2021”.

**Serligar viðmerkingar**
Sambært lógaruppskotinum skuldi lógin fara úr gildi aftur tann 31. desember 2020, men við hesum broytingaruppskoti fer lógin úr gildi aftur tann 1. februar 2021.

Við hesi broyting tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 3. desember 2020**

Bjørt Samuelsen
formaður

Johan Dahl
næstformaður

Bjarni Hammer

Henrik Old

Bjarni Kárason Petersen

Beinir Johannesen

Jákup Mikkelsen